## DAGSINS MEINING

# SEV sín part av ábyrgdini

Skjótt farna vikan sýndi enn einaferð, hvussu ógvusligar avleiðingar tað kann hava á samfelagið, tá verkføll verða sett í verk. Verkføll, sum eru til stóran skaða fyri útflutningsvinnu okkara, har orð sum álítandi og støðugar leveransur teljast millum týdningarmestu lyklaorðini, um vit skulu hava nakran sum helst møguleika at standa okkum í kappingini á einum alt meira globaliseraðum marknaði.

Síðani tað stóð greitt, at Løgtingið fór at leggja seg út í trætuna og við lóg steðga verkfallinum, hava skotryðjurnar verið bæði harðar og drúgvar, og fyri tað nógva hava hesar verið skotnar móti politikarum og fakfeløgum.

Tað tykist soleiðis, sum hevur SEV sjálvt fullkomuliga klárað frísak í hesum, og tað er undrunarvert. Tí í veruleikanum er tað helst her, at størsti bukkurin er grivin. Aðru ferð á rað hevur SEV samrátt seg til ein sáttmála, sum ikki verður góðtikin av landinum. Og meðan tiltøk og verkfall varð við hóttanina seinast, fingu allir føroyingar hesa ferð sviðan at kenna, tá SEV enn einaferð samráddi seg til ein sáttmála, sum var væl omanfyri tað, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði givið tilsøgn um. Ein sáttmála, sum SEV tí var væl vitandi um, ikki fór at verða góðkendur. Ein kann ivast í tí skilagóða í, at landstýrismaðurin skal góðkenna sáttmálarnar hjá SEV, men soleiðis er núverandi skipan, og eigur SEV leiðslan at handla hareftir.

Og tí líkist tað mest av øllum ryggloysi, tá SEV aftur forhandlar seg til ein sáttmála, sum er omanfyri tað, sum teir vita kann góðkennast. Júst sum tá fólk skriva kekkar, sum dekningur ikki er fyri. Argumentið hjá SEV fyri tveimum árum síðani var, »at landsstýrismaðurin plagar kortini at góðkenna sáttmálan«, men hetta varð ikki gjørt. Hesuferð átti SEV væl og virðiliga at vitað, at sáttmálin heldur ikki fór at verða góðkendur. Men SEV valdi løttu loysnina, sum var at blaka apuna víðari. Tí sjálvandi var SEV eisini vitandi um, at løgtingið ikki fór at lata landið liggja í streymloysi. Tað vildi av sonnum verið ábyrgdarleyst.

Undir viðgerðini í tinginum vísti andstøðan manglandi vilja ella evni til at loysa málið í skundi. Ikki tí, hugskot Tjóðveldisfloksins um at broyta kommunustýrislógina er eitt gott hugskot, men at fara í holt við tað, tá tað umræður at tryggja samfelagsvirði við at fáa streymin aftur sum skjótast, svarar til at fara út at keypa roykalarmar, eftir at eldur er komin í skrellispannina. Nú tá málið er útsett, so eigur Løgtingið at umrøða kommunustýrislógina, tí ikki hongur tað saman, at man ætlar at leggja meir út til kommunurnar at umsita, samstundis sum man vil varðveita centralstýring í Fíggjarmálaráðnum. Antin hevur man álit á kommununum, og so eigur man at broyta kommunustýrislógina, ella hevur man ikki álit á kommununum, og so skal man varðveita verandi skipan, men ikki leggja meir út til kommunurnar.

**Sosialurin**

# Nýggi Smyril

**Ein virðismikil men ein rakstrartung verkætlan.**

**Ein farleið fyri og onnur eftir vórðu í sínari tíð tiknar frá privatum og lagdar landskassanum. - Alt er broytt, krøvini eru økt og økjast við ferð.**



**Jógvan við Keldu,**
*landsstýrismaður í samferðslumálum:*

Fyri kortum hevði Heðin D. Poulsen áhugaverda grein í fjølmiðlunum undir heitinum "Nógvir góðir reiðarar til Smyril", har hann m.a. helt fyri, at, "í Føroyum eru nógvir dugnaligir reiðarar kring landið. Reiðarar við royndum at umsita skiparakstur, manningarviðurskifti ……." og víðari:

"at landið sum eigari av nýggja Smyrli bjóðar raksturin av Smyrli út til tann best egnaða reiðaran at umsita og reka".

Hetta var grein í samband við hugskotið hjá Jacob Vestergaard um rakstur av Suðuroyarleiðini.

At áhugi er fyri nærri at umrøða, hvussu vit best reka Suðuroyðar-leiðina, bæði tænastu- og fíggjarliga, er tiltrongt, tí hetta er og fer at verða ein týdningarmikil men kostnaðarmikil verkætlan.

Av størru økjunum, verður Suðuroyðarleiðin, einasta siglingarleið, ið hevur drúgva siglingartíð. Sandoyggin liggur hóast alt nærri.

Í dag eru krøvini: dygg góðska, lægstu prísir og skjótastu avgreiðslu!

Tað eru ikki so mong ár síðani, at so gott sum allar sjóvegisrutur lógu á privatum hondum. Hetta var í teimum tíðum, tá færri fólk ferðaðust og krøvini vóru sera avmarkað.

Eitt nú høvdu Mortensens-menn Suðuroyarfjørð, N. Niclasen Tórshavn-Vágar, Kjølbro Klaksvík-Eysturoy-Tórshavn meðan aðrir høvdu útoyggjar, Vestmanna-Fútaklett o.s.fr.

### Samferðslumynstrið broyttist

Sum árini gingu, tóku landsins myndugleikar yvir ruturnar, eina fyri og aðra eftir. Krøvini øktust, fíggjarliga ískoytið úr landskassanum eykaðist, nýggj og meiri tíðarhóskandi skip fingust til vega, samstundis sum undirstøðukervið á landið varð útbygt.

Fíggjarliga hallið fylgdi krøvunum, tí ferðaseðlaprísirnir hækkaðu ikki samsvarandi útreiðslunum, tí sterkt og gott ferðasamband er grund-leggjandi táttur vinnuliga og á øðrum økjum í einum og hvørjum vælvirkandi og nútímans samfelagi.

At fáa eina farleið so langt frá politisku skipanini sum gjørligt, er rætt, men soleiðis sum samfelag okkara er uppbygt, verða krøv sett til almenna samfelagið, serliga nú sjóvegisfarleiðirnar fækkast.

Vit eiga eisini hava í huga, at fíggjarligu krøvini frá borgarum til tað almenna eru vanliga kostnaðarmiklari enn móti privatfeløgum.

### Neyðugt við nýhugsan

At Strandferðslan við tíðini hevur upparbeitt ein serkunleika á økinum, telur nógv, men skal henda farleið einsamøll gjalda kostnaðin av rakstri-num, so eru í løtuni ikki møguleikar til tað.

Um so var, at eitt privat felag við rakstraríkoyti frá landskassanum rak farleiðina, er uttan iva møguleiki fyri, at nýhugsan og hugsskot kanska kundu givið ferðavinnuni nýggjar leiðir og fleiri møguleikar at ganga, brúkt íløguna betri, samstundis sum breiða vinnan fekk meiri burturúr. Nógv uppskot hava verið frammi.

Vit løgdu upp yvirfyri samferðslubólkinum í Suðuroy at arbeiða víðari málinum, tí her skulu nógvar kanningar gerast, men málið er áhugavert.

Sjálvt um vit eiga dugnaligar reiðarar, sum kenna til skiparakstur, manningarviðurskifti o.s.fr., er ikki vist, at tað er loysnin.

### Uppskot kærkomin

Givið er, at skipið verður kostnaðarmikið at reka, og nógv átøk skulu til fyri at fáa javnvág í raksturin. Øll uppskot verða tikin til viðgerðar og hildin upp í ljósið, vigað og kannað. Hetta skal verða rikið á so handils-ligum grundarlagi sum gjørligt.

Rætt er, at samstundis sum hetta er ein tænasta fyri allar føroyingar og dagliga serliga fyri suðuroyingar, skal raksturin so væl sum gjørligt, hvíla í sær sjálvum.

Men eg fari at leggja dent á, at Smyril er bygdur til at røkja Suður-oyarleiðina, og til tað verður hann bygdur.

Eg fari at enda at staðfesta, sum sagt, at ein farleið fyri og onnur eftir varð tikin frá privatum og løgd landskassanum at reka, og samanumtikið hevur verið neyðugt við fíggjarligum tilskoti úr landkassanum.

Broytingar eru stórar, krøvini eru økt og økjast við ferð.

# Eingin venjing - eingin sparing

**Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoterapeutfelagið**

Sparingar innan almannaverkið fara at hava við sær, at venjingartilboðini hjá fysio- og ergoterapeuti, sum heimabúgvandi pensionistar í Tórshavn hava havt atgongd til síðan 2002, nú verða spard burtur.

Feløgini Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoterapeutfelagið gera við hesum vart við, at hesar sparingar ikki eru so frægt sum løtuvinningur. Tvørturímóti fara sparingarnar at hava við sær tyngri brúkarar í heimarøkt, heilsuverki og røktarheimum í nærmastu framtíð.

Tey eldri verða alt fleiri og eldri í mun til fólkatalið og nógv teirra liva leingi við kroniskum sjúkum og brekum. Nógvar kanningar eru gjørdar um nyttuna av venjing til hesi og allar vísa tær, at venjing ger, at tey klára seg betri uttan hjálp, tey verða minni røktarkrevjandi og teirra lívsgóðska hækkar so tey fáa ein betri dagligdag í allar mátar.

Í okkara grannalondum er venjing tí ein tænasta, sum dentur verður lagdur á at veita øllum heimabúgvandi eldri. Samanborið við okkara grannalond, eru Føroyar í stóran mun eftirbátar innan venjingartilboð til eldri. Tilboðini um venjing, sum Lágargarður bjóðar eldri borgarum í Tórshavn hava tó verið ein byrjan.

Við at at skera hesi venjingartilboð burtur, verður kostnaðurin innan eldraøkið størri. Tvs. at kostnaðurin fyri venjingatilboð fellur burtur og verður fluttur yvir á meira røktarkrevjandi brúkarar av heimahjálp, sjúkrahúsplássum og røktarheimsplássum.

Vit heita tí á landsins myndugleikar um at forða fyri at hesar skerjingar verða framdar og í staðin at arbeiða miðvíst fram ímóti at tryggja øllum landsins eldri borgarum atgongd til venjing.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.